Yrkingating

Týskvøldið var kvøldseta, Poesikvøld nevnd, hildin í Norðurlandahúsinum

Initiativið kom frá Norðurlandahúsinum, men Oddfríður Rasmussen stóð fyri og var eitt slag av orðstýrara. Lítið fólk var í Klingruni, men nógvir yrkjarar. Rói Patursson, Steinbjørn B. Jacobsen og Jóanis Nielsen og møguliga aðrir. So har manglaðu bara Regin Dahl, Tóroddur Poulsen og møguliga onnur fyri at hava allar livandi føroyingarnar, sum hava skapt føroysku yrkingina. (Hvar er konufólkið?)

Oddfríður Rasmussen legði fyri og dró samanum. Carl Johan Jensen og Petur Jensen skiftust at lesa yrkingar, sum aðrir høvdu skrivað. Treytin, sum fyri tað mesta var hildin, var, at Carl Johan og Peturi skuldi dáma yrkingarnar, teir lósu. Tær skuldu vera yrktar í 1984 ella seinni. Soleiðis skuldi mynd kunna fáast av, hvat føroysk yrking er í dag. Eisini skuldi síggjast, hvussu Carl Johan og Petur eru ávirkaðir av tí føroyska, teir lesa. (Allar vóru góðar.)

Petur og skúlin

Petur Jensen legði fyri við yrkingini Reflex (1967) hjá Róa Paturssyni. Petur segði um yrkingina, at hann kendi seg heima í henni. Var kvøldið longri, fór kjakið kanska inn á, hvat samband er millum eina yrking og tað at dáma hana. Petur kom ikki inn á, hvat tað var, sum fekk hann at kenna seg heima. Reflex er um valdsójavnan millum lærara og næming, m.a., og eg veit, at Petur minst einaferð er rendur úr skúlanum og rýmdur úr einum øðrum. (Hví vóru eingir føroysktflokkar í Norðurlandahúsinum?)

Petur segði, tað var lekkurt, soleiðis yrkjarin breyt orðini og setti tilvildarlig punktum. Undir betri umstøðum kundi kjakið snúð seg um, hví føroyskir yrkjarar nýta ta uppseting og teir formar, teir gera. Og hví tað mangan líkist so nógv (Reflex kann næstan enn ganga fyri at vera alternativ í so máta). Arkaisku formarnir eru fyri stóran part farnir út, men spurningur er, um teir ikki rúma fleiri møguleikum í mongum førum. Svarið er ikki at fara aftureftir, men tað hevði ofta verið frægari enn status quo. (Undantøk eru, fleiri.)

Carl Johan og vaskifatið

Morguntváttur úti í trøð var fyrsta yrkingin, Carl Johan Jensen las. Hann segði hana vera eina ta bestu føroysku yrkingina, hoyrdi eg rætt. Carl Johan dugdi betur enn Petur at fyrihalda seg tekniskt og við yvirlitið til yrkingarnar. Hingvegin ljóðaði Petur meir persónligur.

Morguntváttur úti í trøð byrjar við einum, sum ein kaldan morgun hyggur í ein gamlan, sprekkaðan spegil og við eitt varnast eitt bygdarlag, sum er andlit hansara. Andlitið er málingur, og í hesum sá Carl Johan eina skapan, sum altíð er. Henda skapanin verður endurtikin í seinasta partinum, har yrkjarin hyggur niður í fatið við ísakøldum vatni at vaska andlitið í. Eisini har er ein mynd við skínandi sól. Sólin líkist einum eggi, og tað taki eg sjálvur sum tekin um endurføðing, sum hesin helst gamli maður hómar.

Ein kvinna á fremsta raði tyktist kenna yrkingina væl og segði sína hugsan. Slíkt persónligt aftursvar við innlitið átti at fylgt við øllum yrkingunum, men har kom ikki so nógv.

Petur og fliðan

Petur átti so tørn og las yrkingina Fliða hjá Gunnari Hoydal, sum hann hevur skrivað til systur sína Anniku at syngja. Carl Johan og Oddfríði dámdi ikki yrkingina. Oddfríður helt hana hava ov lítið í sær (flóð og fjøra og ein fliða… er tað so liðugt?), og Carl Johan helt hana vera ov retoriska. Sum at lesa eina talu, og ikki eina yrking. Her skilti hann millum lýrikk og retorikk.

Eg sat við eini hugsan, at vit kundu tosað t.d. um føroysku traditiónina í sambandi við hesa yrkingina. Vit liva so nær fjøruni, at tað bara eru fá, sum ikki eru merkt av aldum dagliga. Aldurnar skola í fleiri yrkingum hjá Gunnari Hoydal, og fara vit gjøgnum teir fáu metrarnar av føroyskum yrkingum, síggja vit hesar lítlu skapningarnar, sum hava lýst upp í huganum hjá listafólkinum. Fliðan, tjaldrið, sóljan. Ofta tykist tað barnsligt og hevur onki serligt bit, men hetta Hans Andriasliga er eisini føroysk yrking. 100 ára gamli modernitetinum hevur ikki svølgt tí, men tað er eisini lív, og tað er eisini náttúra, og tað er eisini yrking. Men at tað ikki kemur nakran serligan veg, skal eg geva Carl Johan Jensen viðhald í.

Petur hevur eisini eitt point í, at sungin yrking er serligur partur av tí føroyska, sum livir undir øðrum reglum enn onnur yrking.

Carl Johan

Carl Johan svaraði aftur við Bjargaður, aftur hjá Gunnari Hoydal, sum eisini eru um rørslur havsins. Her sigur hann seg vilja skolast »upp á sandin / gloymdan / við ongum uttan / sjógvin á uppsvølpaðu / tungu míni / umsíðir orðleysur / umsíðir bjargaður.« Carl Johan tosaði um frelsu, sum her er tað sama sum at vera orðleysur. Yrkjarin hevur fingið frið og sleppur frá at yrkja. Hendan bjargingin er knýtt at lívinum í havinum og hevur møguliga struktúrellar røtur í kristindómi (Ichtus=fiskur).

Sum heild dugdi Carl Johan Jensen væl at vísa til europeisku traditiónina, vit eru partur av. Í Skúlin uttan hjá Tóroddi Poulsen sá hann ferðina sum tema, ið gongur aftur frá m.a. Dante. Tóroddur fer gjøgnum havnina, gjøgnum søguna og gjøgnum helviti og skapir eitt gotiskt univers við jarðarferð, katólskari kirkju og gráum fugli í trøinum. Heima aftur nemur hann veruleikan og telur sínar fingrar.

Traditiónin, vit standa í, kundi verið evnið eitt langt kvøld.

Hinar yrkingarnar á skránni vóru Tað luktar hjá Tóroddi Poulsen (Petur), Einsemið er ongin grøv hjá Jóanesi Nielsen (Carl Johan) og Adagio hjá Aleksi Niklassen (Petur). Adagio vísti dømi um líkskap millum Petur og Aleks, nevniliga mátin at spæla við orðum, kenna seg fremmandan og (sinnis)sjúka. Tað luktar hevði ein »in your face« dám, sum møguliga kemur frá punk-tónleiki, og sum líkist tí ráða hjá Petur, sum hevur røtur í grunge-tónleikinum, sum í nógvum er 90ara svarið til punkin í 70unum.

Yrkingin og málningurin

Oddfríður endaði kvøldið við eini týddari yrking, sum snúði seg um at yrkja heldur enn at mála. Áðrenn kvøldsetuna í Norðurlandahúsinum fóru konan og eg í listaskálan at hyggja at várframsýningini. Eg sá, at báðar listagreinir hava líknandi trupulleikar. Har er so nógv, sum líkist, og tvey verk hava sjáldan meiri góðsku enn til eitt. Hetta kvøldið í Norðurlandahúsinum vísti, at nógv er gott, og yrkingin eigur fleiri góðar vinir, men ov nógv hvílir á gomlum brøgdum.

Jana nýggjur formaður

Jana H. Dalsgaard er vald til nýggjan formann í Sjúkrasystrafelag Føroya, ístaðin fyri Joan Ziskason, sum hevur verið formaður í fimm ár

Sjúkrasystrafelag skal nú hava nýggjan formann.

Tað er Jana H. Dalsgaard, sum nú er vald til nýggjan formann í Sjúkrasystrafelag Føroya.

Jana H. Dalsgaard gjørdi herfyri av at stilla upp ímóti Joan Ziskason, sum hevur formaður í felagnum í fimm ár.

Sjúkrasystrar hava hesar seinastu dagarnar atkvøtt um, hvønn av teimum báðum, tær vildu hava til formann.

Atkvøðuseðlarnir skuldu verða lætnir posthúsunum í seinasta lagi 8. mars, og síðani eru atkvøðurnar taldar upp.

Alment skuldi úrslitið kunngerast á aðalfundinum í Sjúkrasystrafelagnum leygardagin.

Alment vil ongin siga nakað um úrslitið enn. Men frá góðum keldum hava vit fingið upplýst, at Jana H.Dalsgaard er vald til nýggjan formann.

Eftir, hvat vit hava fingið upplýst, er Jana H Dalsgaard vald við hampiliga stórum meiriluta. Keldur okkara siga, at Joan Ziskason fekk gott 150 atkvøður, men at Jana H.Dalsgaard fekk slakar 300 atkvøður, so tað vóru næstan 150 atkvøður á muni.

Valskeiðið hjá formanninum í sjúkrasystraformanninum er trý ár.

Jana Højagaard hevur í sínum valuppleggi gjørt vart við, at hon hevur nógv mál á skránni, um tað eydnaðist henni at verða vald.

Eitt nú fer hon at arbeiða fyri betri løn, men annars sær hon tað sum eina stóra uppgávu at brynja sjúkrasystrar til broytingarnar sum eru hendar í samfelagnum og á tekniska økinum.

Og hon heldur eisini, at tað er neyðugt at útbúgva sjúkrasytrar meiri fyri at gera tær førar fyri at átaka sær avbjóðingarnar, sum framtíðin hevur.

Ráðini um Helenu vóru óformell

Talan var ikki annað enn um eina óformella samrøðu, tá Karsten Loiborg frá Umboðsmannastovni Fólkatingsins gjørdi viðmerkingar til Løgmansskrivstovuna um pensjónsmálið. Hetta ger hann greitt, eftir at telefonupprit frá samrøðuni varð endurgivið í Sosialinum týsdagin

PENSJÓNSMÁLIÐ

John Johannessen

Tá embætismaðurin hjá Fólkatingsins Umboðsmannastovni gjørdi viðmerkingar til leiklutin hjá Helenu Dam á Neystabø í pensjónsmálinum, var tað ongantíð meingin, at viðmerkingarnar skuldu koma út alment. Talan var um eina óformella samrøðu við góðum ráðum frá embætismanni til embætismann

Samrøðan millum Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóra, og løgfrøðingin hjá Fólkatingsins Umboðsmannastovni, Karsten Loiborg, um frágreiðingina hjá Løgdeildini í Tinganesi um pensjónsmálið, var bert ein óformell samrøða við privatpersónin, Karsten Loiborg.

Hetta ger Karsten Loiborg greitt í skrivi til Sosialin í sambandi við grein, sum varð prentað í Sosialinum um pensjónsmálið týsdagin.

Karsten Loiborg sigur, at hann eftir áheitan frá løgmansstjóranum hevur viðgjørt nakrar løgfrøðiligar spurningar, ið hava samband við pensjónsmálið. Men hann staðfestir, at hann hevur gjørt sínar viðmerkingar sum privatpersónur.

– Eg havi ikki gjørt mínar viðmerkingar sum embætismaður hjá Fólkatingsins Umboðsmanni, sum annars ongan myndugleika hevur yvir føroysku myndugleikum, sigur Karsten Loiborg.

Karsten Loiborg sigur eisini, at hann gjørdi løgmansstjóranum ógvuliga greitt, at hann bert gjørdi sínar viðmerkingar sum privatpersónur.

Kortini stendur í breddanum á telefonuppritinum, sum Marjun Hanusardóttir hevur skrivað eftir samrøðuna við Loiborg, at talan er um eitt »telefonupprit um samrøðu við Carsten Lojborg frá Umboðsmannastovni Fólkatingsins hin 20.02.01«

Víðari við málinum

Greinin í Sosialinum týsdagin endurgevur brot úr uppritinum og sigur, at upprit frá løgfrøðingi hjá Fólkatingsins Umboðsmannastovni mælir løgmanni til at fara víðari við málinum.

Í uppritinum hjá løgmansstjóranum stendur soleiðis skrivað:

»Hóast landsstýrismaðurin fer sjálvur við aðrari grundgeving, so er ikki vist, at eitt slíkt mál er liðugt. Í Danmark vildi verið umhugsað, hví málið gekk so galið. Spurningar høvdu verið settir um, hvørt tað eru serligir trupulleikar í embætisverkinum, og myndugleikin hevði verið eftirhugdur antin so ella so.«

Men Karsten Loiborg sigur nú, at hann ikki hevur mælt løgmanni til at fara víðari við málinum.

– Eg havi svarað spurningum frá løgmansstjóranum um, hvat hevði verið gjørt í einum líknandi máli í Danmark. Í hesum sambandi havi eg svarað, at tað mær kunnugt ikki er nakað heilt líknandi danskt mál til skjals. Men annars havi eg víst á ymiskar spurningar, sum eg vildi hildið høvdu verið umhugsaðir og kannaðir í einum líknandi máli, sigur Karsten Loiborg.

Einki um revsing

Greinin í Sosialinum týsdagin vísti á, at tá landsstýrismálanevndin tók upp málið um embætisførsluna í pensjónsmálinum, vóru nøkur innanhýsis skjøl í Almanna- og Heilsustýrinum, sum landsstýrismálanevndin ikki fekk fatur á, tí Helena Dam á Neystabø metti tey ikki vera neyðug at útflýggja.

Hetta heldur Loiborg sambært telefonuppritinum eisini. Har sigur hann soleiðis:

»Tað er “meget åbenbart”, at landsstýrismaðurin hevur afturhildið upplýsingar fyri tingsins nevnd. Hesi skjøl eru á ein hátt at meta sum kjarnin í málinum, og tað áliggur á ongan hátt landsstýrismanninum at meta um, hvørt hesi skjøl eru viðkomandi ella ikki.«

Tískil valdi Sosialurin at vísa á, at hetta sambært lógini um ábyrgd landsstýrisins er hetta revsivert.

Í stykki 2 í grein 5 í lógini um ábyrgd landsstýrisins stendur, at løgmaður ella landsstýrismaður verður revsaður, um so er, at løgmaður ella landsstýrismaður gevur løgtinginum skeivar ella villeiðandi upplýsingar, ella um hann, tá løgtingið viðger eitt mál, tigur við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri tingsins meting av málinum.

Men Karsten Loiborg vísir í skrivinum til Sosialin í dag á, at hann ikki er komin við nakrari beinleiðis meining um hetta í telefonsamrøðuni við løgmansstjóran. Hann gjørdi haraftúrmóti greitt, at tað skal prógvast, at ein persónur tilætlað hevur gjørt nakað skeivt, um hann skal kunna dømast.

Skuldi ikki út

Tá Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, og Karsten Loiborg tosaðu saman um leiklutin hjá Helenu Dam á Neystabø í pensjónsmálinum, visti hann ikki av, at eitt innanhýsis telefonupprit skuldi gerast av samrøðuni. Og ikki fyrr enn hann sá greinina í Sosialinum, sá hann innihaldið í uppritinum.

Uppritið hevur Marjun Hanusardóttir gjørt sum eitt innanhýsis upprit í sambandi við, at løgmaður skuldi taka støðu til avleiðingarnar av niðurstøðuni hjá Løgardeildini í Tinganesi um embætisførsluna hjá Helenu Dam á Neystabø í pensjónsmálinum. Tað var ongantíð meingin, at skjalið skuldi koma út. Men Sosialurin fekk kortini hendur á tí.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, metir tað vera sera álvarsligt, at innanhýsis skjøl í Tinganesi koma út alment, uttan at loyvi er givið til tess.